# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*23. juni fingu Maj og Martin Sirkovsky, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.*



*1. august fingu Irdi Viðbjørg, Fredensborg og Mortan Nolsøe, Tórshavn, ein son á Hillerød sygehus. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3730 gr.*



*2. august fingu Marjun Jørgensen, Tórshavn og Regin T. Midjord, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4400 gr.*

9. juni fingu Marta Wang Jøkladal, Miðvágur og Ingálvur Jøkladal, Hoyvík, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3660 gr.

29. juni fingu Mariann og Bardo Rios, Tórshavn, eina dóttur, fødd í Keypmannahavn. Hon var 55 cm. long og vigaði 4200 gr.

12. juli fingu Ann Siri Hentze og Fróði Danielsen, Malmø, ein son og Daniella ein lítlabeiggja.

13. juli fingu Mirka Wischnewski-Hauritz og Ivan Hauritz, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

20. juli fingu Jóna og Ólavur Thune, Saltangará, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3185 gr.

20. juli fingu Ella og Moodi Norðberg, Hvalba, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4000 gr.

20. juli fingu Annika og Eyðfinn Joensen, Hov, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4200 gr.

21. juli fingu Anna Løwe og Hendrik Sørensen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

21. juli fingu Linda Hansen og Poul Nolsøe Sørensen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3730 gr.

22. juli fingu Katja Gaasedal og Jan Eyðfinn Egholm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

23. juli fingu Elin Sarita Eginsdóttir og Niclas Heri Jákupsson, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2600 gr.

23. juli fingu Kaja Hansen og Jónstein Olsen, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4900 gr.

23. juli fingu Hildur Michelsen og Samson Højgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3950 gr.

25. juli fingu Berghild Jacobsen og Ólavur Frederiksen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3305 gr.

26. juli fingu Rúna og Eddie Magnussen, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3500 gr.

26. juli fingu Sonja og Finn Steinhólm, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3925 gr.

27. juli fingu Lis H. Magnussen og Fróði Magnussen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

27. juli fingu Sunrid og Heini Mýlingstind, Kvívík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

28. juli fingu Annika á Steig Egholm og Hendrik Egholm, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 3100 gr.

28. juli fingu Martha og Tummas Pauli Mýri, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3150 gr.

29. juli fingu Súsanna Hansen og Ove Davidsen, Glyvrar, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4300 gr.

29. juli fingu Beinta Djurhuus og Kjell Johansen, Skála, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

29. juli fingu Anita og Tróndur Niclasen, Bøur, eina dóttur. Hon var 51,5 cm. long og vigaði 3850 gr.

30. juli fingu Alice og Jónhard Frederiksberg, Skála, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

30. juli fingu Herborg G. og Andri Hansen, Norðragøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4700 gr.

31. juli fingu Maiken Sigmundsdóttir og Høgni Jacobsen, Kollafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3840 gr.

31. juli fingu Maria og Jógvan Garðsá, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 4280 gr.

1. august fingu Elin og Andras Eliassen, Rituvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4335 gr.

1. august fingu Sigrid og Jóannis Fonsdal, Tórshavn, ein son. Hann eitur Sámuel, Hann var 57 cm. langur og vigaði 5325 gr.

3. august fingu Laila og Niels Weihe, Lamba, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2950 gr.

3. august fingu Eyðdis Nielsen og Eyðun Niclasen, Norðragøta, ein son. Hann var 60 cm. langur og vigaði 4500 gr.

## Minni um abba mín

# Jarlgrim Johannesen, Miðvágur

## sum vildi verið 100 ár mánadagin 8. august



*Jarlgrím Johannesen 1905-1986 og Johanna Sofía (Boys-Hanna) 1908-2004*

*Sólin sá og sendi sínar gyltu strálir á blikstillu vág*
*Friðurin, kvirran og vakurleikin, sum vit kenna Miðvág*
*Tankar sveima í mínum huga, eg síggi tað alt fyri mær*
*Ein einsamallur maður gongur har og hevur tráðu hjá sær*
*Vakur og rankur í kolli og bundnari troyggju oman eftir fer*
*Steðgar á og hyggur upp á luftina - okkurt skýggj á luftini er.*

*Stendur við tráðu í hond, meðan flotið damlar í sjónum har*
*hann minnist til aðrar dagar við báti og slupp - langt burtur sær*
*meðan havbylgjan breyt, men snørið í hond*
*Í øllum veðri at halda tørn - annað lívið var og fjarskotin lond*
*Tó lívið var baldrut og mangan so strævið, hann hugsaði um okkum*
*Niðri á Bakka hjá ommu og abba, jú, altíð tit vóru í okkara tonkum.*

*Tá bygdin byrjar at vakna hann leitar sær til heimið á Bakka*
*sita tey bæði við borðið og minnast altíð Várharra at takka*
*tveyeini tey sita og glað fyri lívið og tær gávur tað gav*
*so góð tit vóru við okkum og mangan kossin tú mær gav*
*munnharpan, harmonikan tey ljóðføri hann spældi uppá*
*eg minnist við longsli tær góðu løtur so mangar tær vóru tá.*

*Abbi, tú ongan mun á nøkrum gjørdi - høgt vit elska títt minni*
*hjálpsamur og so sera góður og altíð við opnum sinni*
*manga góða løtu vit høvdu øll saman - minnini góð á Bakka*
*heimið tykkara altíð var opið, mong hava sitið væl - vit tykkum takka*
*At hjartanum eg goymið tey minni so góð um tykkum bæði*
*Veit tit eru á tí staðnum, hjá Honum, sum á øllum hevur ræði.*

**Hanna**